Fylgiskjal 11

Tórshavn 26. februar 2024

Umhvørvismálaráðið

Gongin 7

110 Tórshavn

Att. Astrid Reinert Øregaard

Sent til: umhvorvi@umhvorvi.fo

Ummæli til uppskot til broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)

Javnstøðunevndin hevur fingið til ummælis uppskot til broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin).

Javnstøðunevndin metir hetta lógaruppskot vera eitt lítið stig á røttu leiðini, tó at uppskotið ikki hevur stórvegis broytingar við sær fyri javnstøðuna millum kyn sum heild. Javnstøðunevndin tekur yvirskipað undir við uppskotinum.

Javnstøðunevndin hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið annars:

Mælt verður til, at hámarkið fyri útgjaldi úr Barsilsskipanini verður javnað, til dømis við at knýta útgjaldið at lønarvøkstri, soleiðis at upphæddin ikki lækkar við tíðini.

Umhvørvismálaráðið nevnir í hoyringsskrivi sínum, at fleiri broytingar skulu gerast í barsilslógini í komandi tingsetu. Í hesum sambandi verður boðað Umhvørvismálaráðnum frá, at javnstøðunevndin er farin í holt við at gera eina innanhýsis endurskoðan av barsilsøkinum í síni heild, og tí fer nevndin at koma við fleiri tilmælum seinni í hesari tingsetuni. Nevndin vil tí fegin fáa í boði at gera viðmerkingar aftur, tá fleiri broytingar skulu gerast í Barsilslógini.

Vísandi til rundskriv um lógarsmíð hjá Løgmansskrivstovuni frá januar 2019, vilja vit heita á Umhvørvismálaráðið um at virða ásettu hoyringsfreistina, sum er fýra vikur.

Vegna Javnstøðunevndina

Bjørk Maria Kunoy, forkvinna